# Barnabati skipar fyri ráðstevnu

*Í døgunum 27. og 28. mars skipar Barnabati fyri ráðstevnu, har evnið er børn, ið hava verið fyri kynsligum ágangi*

DAGFINN OLSEN

Tað liggur í navninum, at felagskapurin vil børnunum bata.

Og Barnabati hevur verið við til ymsik tiltøk, fyri at bøta um umstøðurnar hjá børnum og ungum.

T. d. fekk Barnabati 240.000 krónur árliga í 3 ár frá norðurlendskum bróðurfelagsskapum, sum fóru til at fáa upp á beinini Meiaríið í Havn, sum nú er tilhaldsstað hjá ungdómi. Eisini hevur Barnabati barna - og ungdómstelefon, sum nú er víðkað við foreldralinju.

**Ágangur**

Í mars skipar Barnabati fyri ráðstevnu, ið hevur til endamáls at varpa ljós á ein trupulleika, sum hevur verið rættiliga fjaldur í samfelag okkara, men sum alt meira hoyrist um.

Fokus verður sett á kynsmisnýtslu av børnum. Endamálið er at skifta vitan og royndir og at vita, hvussu kynsligur ágangur kann fyribyrgjast.

Ráðstevnan verður á Hotel Føroyum í døgunum 27. og 28 mars. Ráðstevnan vendir sær serstakliga til barnaverndarlimir, lærarar, pedagogar, heilsu- og sjúkrasystrar, sosialráðgevar, men eisini onnur áhugað eru vælkomin at luttaka.

Stevnan er sjálvsagt treytað av, at nóg nógv tekna seg til.

**Sjálvstøðugur felagsskapur**

Barnabati er sjálvstøðugur felagsskapur, sum tann 22. mars 2000 hevur 20 ár á baki.

Felagsskapurin arbeiðir saman við líknandi felagskapum í Íslandi, Noreg og Svøríki, umframt Red Barnet í Danmark og Save the Children Alliance í Onglandi. Barnabati luttekur á fundum hjá norðurlendsku felagsskapunum.

Í mars kemur eisini formaðurin í enska felagsskapinum, Burkhard Gnärig, á vitjan í Føroyum.

Barnabati heldur til í húsunum hjá Reyða Krossi á Bryggjubakka 10 í Havn.

Millum framtíðarætlanirnar hjá Barnabata, er at fáa eitt fólk í starv nakarar tímar um vikuna, tí sera nógv skrivligt tilfar er at taka sær av.

Forkvinnan í Barnabata, Marna Olsen, væntar sær nógv av ráðstevnuni í mars, tí góð og skikkað fólk luttaka.

Hon vónar, at nóg nógv tekna seg sum luttakarar, so stevnan kann gerast veruleiki.





*Elsa Birgitta Petersen, forkvinna Føroya Lærarafelags, á veg til samráðingar í Fíggjarmálastýrinum. Samráðingarnar ganga als ikki væl og fyrsta verkfall í søgu felagsins tykist koma alt nærri*

Mynd Jens Kristian Vang

# Stendur fast sum í klettinum

*Mánadagin fóru Føroya Lærarafelag og lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum enn einaferð til samráðingarborðið, men tað stendur fast sum í klettinum, sigur forkvinnan í Lærarafelagnum, sum nú fyrireikar seg til arbeiðssteðg*

DAGFINN OLSEN

Tað tykist mongum, sum ganga sáttmálasamráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og lønardeildina undir Fíggjarmálastýrinum sera strilti.

Henda hugsan verður staðfest, um ein vitjar tíðindatænastuna hjá Lærarafelagnum á heimasíðu felagsins.

Har stendur stutt og greitt, at samráðingar við Fíggjarmálastýrið 7. februar vóru ikki minni trekar, enn undanfarnu samráðingarumførini.

Hetta var fimta samráðingarumfar, síðani samráðingarnar byrjaðu.

**Sum í klettinum**

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen sigur, at tað gongur ikki væl og at torført er at fáa eyga á ein glotta.

- Vit eru komin sera stutt. Ein kann siga, at heilt lítið av realitetsamráðingum hava verið, sigur Elsa Birgitta Petersen.

- Sigast kann, at tað stendur fast sum í klettinum, sigur forkvinnan í Lærarafelagnum.

Partarnir skuldu aftur á fund í morgun, hósmorgun, klokkan 10, og tað er einasti glottin, metti Elsa Birgitta Petersen í gjár.

Hon vil ikki inn á smálutir í samráðingunum, tí møguliga kemur gongd á, tá partarnir hittast aftur.

**Verkfall**

- Um myndugleikin heldur á at hava somu støðu, sum nú, so verður óivað verkfall, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Sostatt er vandi fyri fyrsta verkfalli í søgu Føroya Lærarafelags, sum nú hevur limir, ið hava verkfallsrætt og tað hevur felagið ikki havt áður. Eldru lærararnir eru flest allir tænastumenn, men yngru lærararnir eru ikki tænastumenn og hava tískil verkfallsrætt. Teir telja umleið 1/3 av limunum í felagnum

Sáttmálin millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið er galdandi til 1. mars.

Í heyst, tann 31. oktober, funnu partarnir fram til eina fyribils semju, sum gongur fram til 1. mars, tí verulig semja kom ikki í lag tá. Í semjuni tá stendur, hvat samráðast skal um nú, men semja fæst nú ikki um hetta.

Føroya Lærarafelag hevur áður sagt, at nú skal veruligur sáttmáli fáast í lag.

**Dyggan stuðul**

Føroya Lærarafelag hevur fingið dyggan stuðul frá limum sínum, sum heita á felagið, um at halda fast við krøvini.

Føroya Lærarafelag hevur m.a. víst á, at nýggja fólkaskúlalógin krevur meira og tískil kostar.

Felagið hevur m.a. lagt dent á lønarkrøv og arbeiðstíð. Felagið ynskir, at skúlaleiðslurnar fáa tíð til umsiting og at lærarar fáa tíð til ráðlegging.

# Blað í hvørt hús um møguligt verkfall

*Føroya Lærarafelag arbeiðir við einum blað, sum skal í hvørt hús, fyri at greiða frá støðuni undan einum møguligum verkfalli*

DAGFINN OLSEN

Føroya Lærarafelag gevur út limablaðið Skúlablaðið, men nú fyririkar felagið eitt eykablað, sum skal í hvørt hús í landinum.

- Vit geva út eitt eykablað undan einum møguligum verkfalli. Tað sita vit og stríðast við nú, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen.

- Blaðið kemur út seinast í februar. Hetta gera vit fyri at greiða frá okkara støðu, sigur Elsa Birgitta Petersen.

Hon leggur afturat, at felagið ikki heilt veit, um fólk eru greið yvir álvaran í málinum og hvat felagið meinar við og tí greiðir felagið frá støðuni í blaðnum

Mótvegis Skúlablaðnum, so verður eykablaðið borið út í hvørt hús.



# Í býin - altíð eitt stað at fara

**Streymoy**


AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO
311234

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Búffar alt vikuskiftið
GALLAN Á HOTEL TÓRSHAVN BJÓÐAR:
Frítt val 98,-
Piparbúffur við piparsós
Hawaii Steak við ananas og piparfrukt
Franskur búffur við persillusmøri
Entrecote við kryddsmør
Enskur búffur við leyki
T-bone Steak við bernaise
Innbakaður búffur við soppasós
Allir búffar verða borðreiddir við fRískum grønmeti, bakaðum epli og chips.
ÓKEYPIS heimkoyring millum kl. 18.00 og 19.00 hvørt kvøld.
Bílegging á tel. 350000
HOTEL TÓRSHAVNAR SJÓMANSHEIM
Sosialurin - 311820

Manhattan PUB & CAFÉ
Opið er:
Mán. - hós.: 17.00 - 24.00
Frí.: 16.00 - 02.00
Ley.: 17.00 - 03.00
Sun.: 17-00 - 24.00
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96
Casablanca
FRÍGGJAKVØLDIÐ 11.02
KL.23.00-03.30
DISKOTEK
18 ára aldursmark
ÓKEYPIS ATGONGD

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

fk Matseðilin
Hósdagin 10. feb.: Gullash
Fríggjadagin 11. feb.: Kotelettir
Leygardagin 12. feb.: Oksasteik
Mánadagin 14. feb.: Milliónbúff
Týsdagin 15. feb.: Karrygrýta
Mikudagin 16. feb.: Minuttbúff
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
MOON-SHOT
spælir til dans fríggja- og leygarkvøldið
Kaggin
www.kaggin.fo
Sosialurin - 311820

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo


**Eysturoy**


EYDNAN
á Oyrarbakka
Dansur verður leygarkvøldið 12/2
OLLI við FIMMBOÐA LISBERG og JÓGVAN OLSEN spæla
KJELL ELVIS luttekur
EYDNAN

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

TAXA
MINI BUSS 3X21

sosialurin
-har tað hendir


**Vilja tygum vi› í Í b‡in - hvønn hósdag**

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur